# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Eitt gott val

Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður í mentamálum, hevur sett Andras Mortensen í starv sum landsantikvar. Landsantikvarurin hevur sum kunnugt ovastu embætisligu ábyrgd av okkara fornminnum og mentanararvi sum heild – við øðrum orðum eitt sera týðandi starv. Andras Mortensen er maður í góðum árum og hartil sera væl útbúgvin – søgufrøðingur og doktari í sínum faki. Í 2001 vardi Andras Ph.D heitið frá Fróðskaparsetri Føroya fyri ritgerðina “Hin føroyski róðrarbáturin, sjómentir føroyingar í eldri tíð”. Ritgerðin varð givin út í bók, og fyri hana varð hann heiðraður við virðisløn M.A. Jacobsens fyri yrkisbókmentir.

Landsstýrismaðurin hevur gjørt eitt gott val, tí eingin ivi er um, at nýggi landsantikvarurin er sera væl skikkaður og hevur teir akademisku og leiðsluligu førleikar, ið krevjast til hetta starvið. Hartil hevur hann stóra virðing í fakliga umhvørvinum úti sum heima. Føroya Fornminnissavn hevur uppiborið eina góða leiðslu. Her er talan um stovn av sera stórum týdningi fyri føroyska mentan og søgu, og harvið hevur stovnurin avgerandi týdning fyri okkara samleika sum tjóð.

Stovnurin umsitur og varðveitir okkara mentanararv. Hetta er ein stór og ábyrgdarfull uppgáva og synd er at siga, at stovnurin hevur fingið góða viðferð av landsins myndugleikum hesi seinastu árini. Men sum kunnugt fyllir mentanararvurin nógv í Visjón 2015 og hetta kundi týtt uppá, at landsins myndugleikar nú eru vaknaðir og loksins hava skilt hvønn týdning stovnurin hevur fyri okkara mentan og samleika. Fornminnissavnið hevur havt tað trupult seinastu árini og hava trupulleikarnir ikki stavað frá stovninum ella starvsfólknum men frá vánaligari politiskari leiðslu. Nú hevur landsstýrismaðurin í mentanarmálum so skorið ígjøgnum og sett ein persón við teimum neyðugu førleikunum at leiða stovnin. Hetta er eitt sera gott val og nú vóna vit øll, at stovnurin fer at mennast og blóma til gagns fyri land og tjóð.

**Sosialurin**

## Hvat vilja vit við Fiskirannsóknarstovuna?

**EYÐSTEIN POULSEN**



Eg meti, at Fiskirannsóknarstovan er ein stovnur, ið ikki dugir at seta sær sjálvum rættar og viðkomandi spurningarnar, og tað er har skeivleikin stavar frá.

Tað er trupult at vera fiskimálaráðharri í hesum døgum, nú grundarlagið fyri hansara tilmælum er til ummælis dag og dagliga. Tað nýggjasta er, at Hjalti í Jákupstovu ikki tolir trýstið longur, og vil hava uttanveltaði fólk at kanna mannagongdirnar á stovni sínum. Hann leggur upp til, at hansara samstarvsfelagar uttan úr heimi skulu keypast heim at kanna, um Fiskirannsóknarstovan arbeiðir rætt út frá einum heimsgeniraliseraðum og bókligum vinkli.

Góði Bjørn, lat teg ikki verða førdan bak ljósið av einum vísindastjóra, sum ikki tekur væl orðaðan kritik til eftirtektar, men hinvegin fer í verjustøðu og biður fólk við somu hugsan, sum hann sjálvur hevur til vísindini, koma inn at forsvara eina haltandi og mangulfulla teori.

Tað, sum eftir míni bestu sannføring hevur størsta týdning fyri alt Føroyaland, er, at vit hava eina nágreiniliga og fomkomna fiskigransking, soleiðis at vit í ein ávísan mun hava tamarhald á, hvat fiskimynstur vit kunnu vænta okkum komandi árini.

Grundarlagið undir granskingini er, at spurningar, sum svarast skulu, eru viðkomandi. Eru spurningarnir skeivir, verður svarið eisini skeivt. Tað er hetta, sum eg vil vísa á. Fiskimaðurin, sum árliga er á fiskifeltinum, kann ikki verða yvirsæddur av granskingini. Tað er júst fiskimaðurin, sum situr við teimum meira viðkomandi spurningunum.

Vit hava í alt ov langa tíð verið vitnir til bæði eina og aðra teori, sum ikki hongur saman, men sum stjórin á Fiskirannsóknarstovuni kortini velur at nýta sum grundarlag undir sínum tilmælum. Hetta stríðir móti sunnum viti og skili. Eg dugi at síggja, at tað er umráðandi, at vit royna allar teoriir og fylgja teimum upp, men tá samsvar ikki er millum teori og praksis, mugu nýggir spurningar setast.

Tað er eitt ótal av faktorum í ávirka okkara náttúrutilfeingið, sum fiskifrøðingar als ikki taka hædd fyri, faktorar sum eru alt avgerandi, og sum geva spurningar, sum byggja millum annað á tilfar, sum fiskirannsóknarstovan sjálv er komin við. Skulu vit fáa svar á hesum spurningum, krevur tað, at Fiskirannsóknarstovan kemur at arbeiða sum ein Fiskirannsóknarstova og ikki sum nú er, har stovan útilokandi arbeiðir sum ein Fiskiveiðirannsóknarstova, enntá við skeivt samansettum veiðihagtølum. Hetta krevur hugsunarbroytingar bæði politiskt, men ikki minst frá stovuni sjálvari. Eg meti ikki, at vit kunnu liva við núverandi skipan. Tilmælini eru so illa undirbygd, og tí velur stovan at binda um heilan fingur við at skerja fiskidagarnar í ríkiligt mát. Hetta sama hevur Fiskimálaráðharrin valt at gera, og kostar tað Føroyalandi á hvørjum ári stórar upphæddir.

Fari til síðst at heita á fólk, sum hava skil fyri jarðbundnum búskapi, um veruliga at vísa teimum yvirordnaðu fiskarífanatisku búskaparfrøðingunum, at vit framvegis liva av fiskivinnuni. Til inntøkan í framtíðini møguliga kemur aðrastaðni frá, kunnu vit ikki liva við, at landið letur peningaligan stuðul til fólk, ið vilja fiskivinnuni illa.

Lat okkum ikki byrja at bróta niður, áðrenn vit hava tryggjað okkum nakað nýtt.

## Útjaðari, útoyggjar og streikur

**MARJUS DAM**
løgtingsmaður



**Eg takið tí undir við, at Løgtingi beinanvegin tryggjar, at ferjur verða undantiknar at verða raktar av møguligum streikum**

Síðan 2002 er ferðslan um Vestmannasund ikki rakt av streiku. Men vit hava ikki gloymt tað miðaldarligu støðu, vit vóru blakaði í, hvørja fer ferjurnar vórðu raktar av streiku.

Tíðin er farin frá at lemja ein part av landinum við at blokera ferðsluna til og frá.

Føroyar eru eftirbátur á hesum øki, so tað stendur eftir. Tað er stór skomm, at slíkt enn kann fyrikoma. Virkir hava kanska bart og strevast í fleiri ár fyri at fáa ein sáttmála við ein keypara. Síðan kemur ein streika og oyðileggur alt. Onkur hevur nevnt, at t. d. matvøruvirki í Skálavík, varð skotið niður av eini streiku, beint eftir at tað var farið á flog. Skaðin var so stórur, at tað ongantíð aftur floygdist. Virkið missir sáttmálan – og fólkið missir arbeiði.

Niðurleggjan av sigling um firðir og sund hoyrir eini farnari tíð til - tí hon rakar fyrst og fremst arbeiðsfólkið, og har serliga tey, ið hava við fiskivinnu okkara at gera.

Um hetta ikki steðgar, so má enn einaferð ásannast, at vit saga greinina av, ið vit sita á. Hendan óvissan ger eisini, at mong virkir ikki tora at binda seg til sáttmálar, ið møguliga ikki kunnu haldast. Tí ongin veit, nær næsta streikan bumbar virkini í sor.

Eg havi í mong ár hildið, at samferðslan ímillum oyggjarnar ikki eigur at verða rakt av streikum. Eg meti, at løgtingi eigur at loysa hendan trupulleika einaferð med alla.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.